# 14 stig resta í



*Miðvallarin, Nenad Stankovic, er ein av nýggju monnunum í bláu troyggjuni hjá KÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR** Málið er at sleppa undan niðurflyting, og hagtølini siga, at tað krevst um 24 stig at varðveita sætið í deildini. KÍ hevur 10 stig eftir fýra landskappingardystir

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| 07 Vestur | 3 |
| KÍ | 3 |

## Viðhaldsfólkini vóru væl nøgd við úrslitið. Tað ræður fremst av øllum um at varðveita sætið í deildini

Klaksvíkingar hava framvegis bæði beinini á jørðini. Tað var staðfest mánadagin, tá KÍ fekk eitt stig burtur úr vitjanini í Sørvági. Viðhaldsfólkini vóru væl nøgd við úrslitið. Tað ræður fremst av øllum um at varðveita sætið í deildini. Tískil er tað nøktandi at fáa eitt stig á útivølli móti hinum uppflytaranum. Eitt stig rætta vegin. Serliga, tá hugsað verður um, at klaksvíkingar vunnu fyrstu tríggjar landskappingardystirnar.

### Undirhald

Seks mál boðar frá undirhaldandi dysti. KÍ hevði vindin, sum darvaði spælinum nakað, undan fyri steðgin. Tað gagnnýttu klaksvíkingar og vóru á odda í hálvleiki. Clayton Soares syrgdi fyri við tveimum málum miðskeiðis í seinna umfarinum, at 07 Vestur stevndi móti sigrinum. Kristoffur Jakobsen syrgdi við einum flottum máli fyri, at úrslitið varð 3-3.

Tað var samstundis fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, at klaksvíkingar missa stig. Tað setir hinvegin ikki dagsskránna í Klaksvík. Tað ræður um at varðveita sætið í deildini. Tá málið er rokkið, ber til at miða hægri.

Tað er hugburðurin í Klaksvík.

uni@sosialurin.fo



*B68 fekk sítt fyrsta stig til høldar mánadagin. Toftamenn, sum ætlar sær at stríðast um plássini, sum geva atgongd til altjóða kappingar, høvdu einki stig eftir fyrstu tríggjar landskappingardystirnar*

*Mynd: Heðin Weihe, www.hb.fo*

# Dysturin skuldi ikki verið spældur

**FÓTBÓLTUR** – Tað var ikki gott fótbóltsveður á Svangaskarði, og tað er keðiligt, at dysturin varð spældur, sigur Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68. Toftamenn hava fingið fyrsta stigið

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| B68 | 0 |
| HB | 0 |

Vindurin hevur darvað landskappingardystunum á Svangaskarði í hesum kappingarárinum. Tá fuglfirðingar vunnu á Toftum í fyrsta umfarinum, vóru tað fleiri sum søgdu, at tað var ikki rætt at fara undir dystin.

Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68, hevur somu støðu hesaferð. Vindurin darvaði fótbóltsspælinum, tá hvørki B68 ella HB fekk mál á Svangaskarði.

– Tað var ikki gott fótbóltsveður á Svangaskarði, og tað er keðiligt, at dysturin varð spældur. Ikki tí. Úrslitið hevði helst verið tað sama, um eingin vindur var, heldur Bill M. Jacobsen.

### Stigið fløvar

B68 fekk sítt fyrsta stig til høldar mánadagin. Toftamenn, sum ætlar sær at stríðast um plássini, sum geva atgongd til altjóða kappingar, høvdu einki stig eftir fyrstu tríggjar landskappingardystirnar. Tað var ikki nøktandi. Málið er framvegis ikki broytt.

– Tað fløvar sjálvsagt at fáa eitt stig, tá vit hava lagt so mikið illa frá landi, sigur Bill M. Jacobsen.

Hann ræddist ikki at spenna álopsbogan hesaferð. Jón Krosslá Poulsen, HB, sum stóð seg væl, var útvístur stutt fyri hálvleik eftir hevnisøku, men hóast tað, eydnaðist ikki at seta verandi føroyameistararnar undir størvegis trýst. HB fór nøkur fet aftur á vøllin í seinna hálvleiki, og tað gav B68 minni pláss at spæla á. Gestirnir smæddust ikki burtur og settu stundum Tórð Thomsen, málverjan hjá B68, undir trýst. Heðin Stenberg, sum vardi málið hjá HB, vardi meistarliga fyri eini atsókn hjá heimaliðnum í síðstu løtu. Annars høvdu toftamenn ikki størvegis at bjóða.

### Virðing fyri sandoyingum

Um lív framvegis skal vera í vónini at røkka málinum, at spæla í altjóða kapping í 2012, er neyðugt, at B68 skavar nógv stig saman næstu dystirnar. Fyrsta uppgávan er B71 á útivølli. Bill M. Jacobsen veit, hvør treytin er, men hann hevur stóra virðing fyri sandoyingum.

– Vit hava ofta trupulleikar av B71. Vit vísa teimum sjálvsagt stóra virðing. Hinvegin eru treytirnar einfaldar, og vit hava tørv á trimum stigum, ger Bill M. Jacobsen greitt.